# 10.000 krónur í olju til húsini frá Shell

**Haldið hitan við Shell**




Í yvir 80 ár hevur Føroya Shell hjálpt føroyingum við at halda hitan, hava maskinur og bilar koyrandi og skipini siglandi.

Tað byrjaði við einari tunnu av olju í 1925, og í dag er talan um eina stóra og landsfevnandi fyritøku, sum undir nútímans umstøðum veitir privatum viðskiftafólkum, tí almenna og vinnulívinum bæði á sjógvi og landi tænastur.

Sum árini eru liðin, er virksemið hjá Shell í Føroyum nógv víðkað. Felagið bygdi sína fyrstu Shell-støð á Frælsinum í Havn, og hon læt upp ólavsøkuaftan 1970. Í dag eru 10 Shell-støðir kring landið og átta Shell-avgreiðslur, har fólk kunnu bíleggja olju og fáa fatur á hitatænastuni, um tað er vorðið øskukalt.

13 tangabilar koyra oljuna hvønn dag um allar Føroyar. Shell innflytir oljuna við egnum skipi, og hon verður flutt til oljugoymslurnar, Shell-støðirnar, latin í tangar hjá húsarhaldum, koyrd umborð á skipini og so víðari.

Shell-støðirnar hava stórt úrval av gerandisvørum, og Shell-netið í Føroyum er soleiðis skipað, at Shell er nær viðskiftafólkunum í gerandisdegnum, og harvið kann veita so skjóta og góða tænastu sum gjørligt á øllum økjum.

Ein tunna í 1925 bleiv sostatt til eitt umfatandi virksemi og sølu í milliónatali av oljulitrum 80 ár seinni. Í 2004 seldi P/F Føroya Shell tilsamans 165.731.000 litrar av olju. Tað er umleið ein millión tunnur.

Í jólakappingini hjá Sosialinum kanst tú vinna olju til tíni hús fyri 10.000 krónur. Sjálvandi koyrt í tangan av oljubili hjá Shell.

# Merrild kaffi og Faxe frá Poul Michelsen

**10 kassar av Faxe Kondi sodavatni frá P/F Poul Michelsen**

**8 kilo av Merrild Kaffi frá P/F Poul Michelsen**




Heilsølan hjá Poul Michelsen er landskend fyri at verða fremst innan sølu- og handfaring av køli- og frystivørum. Eisini hevur heilsølan lagt seg efter sergreinum innan frukt og grønt, vistarveiting (catering), proviantering- og bakaravørum, og í 2002 yvirtók PM søluna og útkoyringina av drykkjuvørum hjá Bryggerigruppen (Faxe) í Føroyum.

Seinasta nýggja er, at PM nú eisini bjóðar seg fram sum heildarveitara bæði innan matvøruhandil og matvørur til stórkøkar v.m.

P/F Poul Michelsen varð sett á stovn 1974, og fyritøkan er ein nýmótans og kappingarfør heilsøla. Umleið 50 fólk starvast hjá PM.

Í jólakappingini hjá Sosialinum eru tveir vinningar frá Poul Michelsen. Annar er 10 kassar av sodavatni frá Faxe Kondi, sum er eitt sera væl umtókt sodavatn í Føroyum. Hin vinningurin er heili 8 kilo av Merrild kaffi.




# Búgv sum ein kongur í Havn

**Familjuvikuskifti í Kongasvituni á Hotel Tórhavn fyri tvey vaksin og tvey børn. Við gávukorti til Pizzacafé, Havnar Bio og Bowlinghøllina**

*Tað ber illa til at búgva betur í Havn enn í Kongasvitan á Hotel Tórshavn, har tú og familjan kunnu taka tykkum av løttum nakrar dagar*

Hotel Tórshavn liggur mitt í Havnini, og besta rúmið á hotellinum er Kongasvitan, har tað ber til at búgva sum ein kongur. Kongasvitan er eitt ræţtiligt marglætisrúm á hotellinum, og útsýnið yvir Vágsbotn er flott og hugtakandi.

Her hevur tú kjansin at búgva saman við familjuni í nakrar dagar, meðan tit kunnu taka tykkum av løttum og njóta tilboðini, sum høvuðsstaðurin hevur at bjóða.

Hotel Tórshavn hevur 27 dupultkømur, 13 einkultkømur og 3 suitur. Á øllum kømrum er sjónvarp, telefon, bað og buksupressa. Øll 2. hædd er nú roykfrí.

Hvønn dag bjóðar Hotel Tórshavn dagsins rætt í matstovuni frá kl. 12:00 til 14:00. Um kvøldið verður borðreitt við a la carte. Ein serlig matskrá er til børnini. Matstovan hevur 66 sitipláss.

Harafturat húsast eisini ein hugnalig pizzacafé á Hotel Tórshavn, og har er eitt stórt úrval av pizza, pasta og kebab at fáa. Eisini ber til at forkela seg sjálvan við kaffi og ymiskum dessertum. Caféin hevur 45 sitipláss og er opin frá kl. 12:00 til 21:45.

Saman við sjálvum uppihaldinum er eisini eitt gávukort til pizzacaféina við í vinninginum.

Á Hotel Tórshavn er spælirúm til børnini, og har er maxamec byggisett, bøkur, blokkar, blýantar og sjónvarp við millum annað barnarás.

Umframt alt hetta umfatar hesin vinningurin eisini gávukort til Havnar Bio, har tað ber til at síggja nýggjastu filmarnar, samstundis sum teir fáa heimspremieru. Desember mánaði verður ein spennandi mánaði í Havnar Bio, tí tveir stórfilmar fáa frumsýning. Annar er filmurin um King Kong, og hin er størsta Disney-framleiðslan nakrantíð, filmurin Narnia, sum er ein ævintýrfilmur. King Kong verður frumsýndur 14. desember, meðan Narnia kann síggjast frá 26. desember.

Og sum rosinan í pylsuendanum ber eisini til at fara at bowla, tí eitt gávukort til Bowlinghøllina er við í vinninginum. Bowlinghøllin í Havn er eitt sera væl umtókt frítstað fyri bæði ung og gomlu. Áhugin fyri at bowla hevur verið so stórur, at Bowlinghøllin hevur fingið sær fleiri bowlingbreytir, og nú er eisini eitt nýtt matstað komið í høllini. Harafturat er ætlanin at lata upp eina ítróttarcafé í Bowlinghøllini.

